# Ósamd um semingsroynd

**Løgmaður og landsstýrismaðurin við skúlamálum eru sinnaðir at virka fyri eini loysn á skúlatrætuni á Trøllanesi, men tað er ymiskt, hvussu hetta verður móttikið í Kalsoynni. Hvørgin parturin vil slaka**

TRØLLANES-TRÆTAN
*Eyðun Klakstein*

**Kalsoy:** Í farnu viku søgdu bæði Anfinn Kallsberg og Óli Holm, at teir vóru sinnaðir at virka fyri eini loysn á drúgvu trætuni um skúlan á Trøllanesi.

Men tað er ymiskt, hvussu fólk í Kalsoynni taka ímóti hesum úttalilsunum.

Foreldrini á Trøllanesi, sum ikki vilja senda børn síni í skúla í Mikladali, tí tey vilja hava skúlan á Trøllanesi tiknan í nýtslu aftur, heilsa eini semingsroynd frá landsstýrinum vælkomnari.

Men í Mikladali verður hugskotið hjá landsstýrismonnunum ikki eins væl tikið upp.

– Eg dugi ikki at síggja, hvat løgmaður og landsstýrið skulu kunnu gera. So leingi sum foreldrini á Trøllanesi halda fast um sítt krav um, at skúlin í bygdini skal lata uppaftur, os ber tað ikki til at finna nakra loysn, heldur Christian Andreasen, sum er limur í Mikladals bygdaráði.

## Drúgt stríð

Trætan um skúlan á Trøllanesi stóð alt í einum í ljósum loga, tá skúlagongdin skuldi byrja aftur í august mánaði. Tað gjørdist tað greitt fyri foreldrunum á Trøllanesi, at skúlin í bygdini skuldi ikki takast í nýtslu aftur, soleiðis sum tey hildu.

Gamla bygdaráðið hevði seint í 2000 samtykt, at skúlin skuldi lata uppaftur, men nýggja bygdaráðið, sum tók við í januar í 2001 kolldømdi hesa avgerð á fyrsta fundi sínum.

Foreldrini á Trøllanesi vóru so misnøgd við hetta, at tey tóku tey átta skúlabørnini úr skúlanum, og síðani hava hesi børn ikki verið í skúla í Mikladali.

Foreldrini skipa sjálvi fyri heimaundirvísing, og sambært lærara úr Klaksvík, sum hevur eftirlitið við hesi undirvísing, duga børnini yvir miðal. Men øll eru tó greið um, at hetta er eingin varandi loysn.

## Broytir einki

Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur fleiri ferðir sligið fast, at tað er bygdaráðið í Mikladali, sum hevur avgerðarrættin í hesum máli, og tí kunnu landsmyndugleikar einki formligt gera í hesum máli.

Hevur bygdaráðið ikki hug at taka skúlan á Trøllanesi í nýtslu aftur, so er hendan avgerðin endalig.

Men í farnu viku gloppaði løgmaður dyrnar fyri, at hann kann gera eina roynd at finna eina loysn á drúgvu trætuni.

– Eg veit ikki, hví vit skulu tosa við øll onnur enn tey, sum vit eiga at tosa við. Tað eru fleiri, sum hava roynt at finna eina loysn, men tað hevur ikki riggað, sigur Christian Andreasen, kommunustýrislimur í Mikladali.

– Tí dugi eg heldur ikki at síggja, at tað skal broyta nakað, fyri tað um løgmaður og Óli Holm ætla sær at gera eitthvørt.

## Onkur má slaka

Christian Andreasen heldur, at tað er bara ein loysn á trupulleikanum, og tað er, at foreldrini á Trøllanesi slakar, tí bygdaráðið í Mikladali ætlar sær ikki at broyta sína avgerð.

– Vit eru vald av fólkinum til at stýra kommununi so skilagott, sum tað ber til, og tað halda vit okkum gera. Vit halda, at vita hava tikið røttu avgerðina um skúlan á Trøllanesi, og hesa avgerð ætla vit ikki at broyta, sigur hann.

– Tað ber ikki til, at foreldrini á Trøllanesi skulu diktera bygdaráðið at broyta ein avgerð.

Foreldrini á Trøllanesi halda, at tað hendir einki í málinum, og tí halda tey, at tað er ein gott hugskot, at umborð fyri landsmyndugleikarnar gera eina roynd at finna eina loysn.

Eitt er tó vist. Skal nøkur loysn finnast í málinum, so verður onkur noyddur at slaka, og í løtuni standa báðir partar rimmarfast við sína støðu.



*– So leingi sum foreldrini á Trøllanesi halda fast um sítt krav um, at skúlin í bygdini skal lata uppaftur, os ber tað ikki til at finna nakra loysn, heldur Christian Andreasen, sum er limur í Mikladals bygdaráði*

# Flogvøllurin má hava fleiri parkeringspláss

**Vágatingmaðurin Marjus Dam spyr landsstýrismannin, hvørjar ætlanir hann hevur um at økja um talið á parkeringsplássum við flogvøllin**

PARKERING
*Eyðun Klakstein*

Tað hevur bráðskund at bøta um parkeringsviðurskiftini á flogvøllinum í Vágum.

Tað heldur Marjus Dam, tingmaður fyri Sambandsflokkin, sum hevur sett Bjarna Djurholm fyrispurning um hetta mál.

Marjus Dam spyr millum annað landsstýrismannin um, hann heldur, at parkeringsviðurskiftini eru nøktandi, og um hvørjar ábøtur ella útbyggingar ætlanin er at gera.

– Flogferðslan er økt nógv seinastu árini, og samstundis er tørvurin á parkeringsplássum við flogvøllin. Parkeringsviðurskiftini eru ikki nøktandi sum er, heldur Marjus Dam.



## Brúka grannabygdir

Hann vísir á, at um eitt ár verður koyrandi um Vestmannasund, og tá fer ferðslan til flogvøllin at økjast munandi. Tí hevur tað skund at betra um møguleikarnar hjá fólki at seta bilin frá sær, tá tey skulu á flog.

– Í løtuni verða summi fólk noydd at seta bilarnar frá í grannabygdunum hjá flogvøllinum, tí tað er ikki nóg mikið av plássi á parkeringsøkinum við flogvøllin, sigur Marjus Dam.

Hann spyr, hvørjar ætlanir landsstýrið, sum hevur fulla ábyrgd av hesum økið, hevur um at byggja út parkeringsplássið.



# Seinasta summarið í Gásadali

**Komandi summar verður eftir øllum at døma tað seinasta, Gásadalur fer at liggja avbyrgdur frá umheiminum. Væntandi verður tunnilin skotin ígjøgnum í hesum árinum**

TUNNILSGERÐ
*Edvard Joensen*

**Áardalur:** Tað verður helst í hesum árinum, at skotið verður igjøgnum til Gásadals, vænta teir, sum arbeiða við tunnilsgerðini niðan í Dalin. Áðrenn jól vænta teir hol á.

Tað skelvir undir okkum, her vit sita í skrivstovuskúrinum hjá Landsverkfrøðinginum í Áardali, meðan sprongt verður einar 270 metrar inni í fjallinum. Tað gongur ein løta, so fer roykurin at koma út úr tunlinum, og so fara lastbilarnir at koyra grótið frá skotinum út og leggja tað niðanvert munnan her í Áardali uttan fyri Bø.

Jógvan Jákup Jacobsen, sum er arbeiðsformaður, greiðir frá, at tað gongur væl at skjóta, hóast ikki so skjótt, sum tað gjørdi í undirsjóvartunlinum.

– Tað kemst einamest av, sigur hann, at her arbeiðir bara eitt hold, vanliga í dagtímunum. Teir eru seks mans til arbeiðis, og teir spreingja í meðal fimm til sjey skot um vikuna. Fyri hvørt skotið nærkast teir Gásadali einar fimm metrar, sigur hann.

## Grótið

Tað eru í løtuni bara tveir lastbilar, sum verða brúktir til at koyra út. Væntandi fara teir at fáa einar 75.000 til 80.000 rúmmetrar av gróti út úr tunlinum, greiðir formaðurin frá.

Hetta grótið verður í fyrstu syftu lagt uttan fyri tunnilin, tí ein rættiliga stórur partur, helst eini 62.000 rúmmetrar, skulu brúkast til vegagerðina Gásadalsmegin.

Tá komið er út í Gásadali, verður vegurin lagdur niðan í Dalin, áðrenn farið verður oman aftur í sjálva bygdina. Veglongdin Gásadalsmegin verður umleið hálvanannan kjilometur, sigur hann.

Onkur liggur framvið soleiðis av og á at keypa grót. Eitt nú hevur Bíggjar Kommuna, eins og onkur onnur kommuna í Vágum, víst áhuga. Tað er einamest til útstykkingar, grótið verður nýtt.

Tað hevur onkuntíð verið frammi, at grótið eisini skal brúkast til at leingja flogvøllin við, men tað kennir arbeiðsformaðurin einki til. Tað hann veit, sigur hann, skal tað allarmesta brúkast til vegin í Gásadali.

## Roynt fólk

Tað eru royndir menn, sum arbeiða í tunlinum. Sjálvur byrjaði Jógvan Jákup Jacobsen at arbeiða við tunlum í 1979. Hann hevur millum annað verið við til at gera tunlarnar í Kalsoynni, Kunoy, Leirvík, Sumba umframt teir, sum gjørdir eru inn í bergið í Fuglafirði, haðani teir, sum nú arbeiða í Gásadalstunlinum, komu.

Sjálvur tunnilin líkist Kunoyartunlinum. Í grundini sama slag, greiðir Jógvan Jákup Jacobsen frá. Hann er hálvan sætta metur breiður við koyribreyt, sum er halvanfjórða metur breið. Fríhæddin er 4,6 metrar, sum er vanligt í dag. Tað verður bara ein koyribreyt í tunlinum, men fyri hvørjar hálvtannaðhundrað metrar, verður eitt stórt møtipláss.

Tilfarið í fjallinum hevur verið gott at arbeitt við, sigur Jógvan Jákup Jacobsen. Tað er turt, og lítið hevur verið at fóðra. Einar tvær gongir eru teir farnir um, sum tó ikki hava hindrað nevnivert, sigur hann.



*Teir hava skotið í Gásadalstunlinum, og roykurin er á veg út úr tunlinum, áðrenn teir fara at koyra grótið burtur*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Byggiøki er eftir í Fuglafirði

**Tá vit skrivaðu í blaðnum í gjár, at seinastu grundstykkini í Fuglafirði verða brúkt í næstum, er tað bara partvís rætt. Talan er um seinastu útstykkingarnar av kommunalum grundstykkjum. Eftir eru umleið 70 privat grundstykki**

ÚTSTYKKING
*Edvard Joensen*

Í blaðnum í gjár gjørdu vit fuglfirðingum nakað av órætti, tá sagt varð, at einki byggilendi var eftir í Fuglafirði.

Tað, sum Sigurd Simonsen, borgarstjóri, greiddi Sosialinum frá, var, at kommunala byggilendið í Fuglafirði er brúkt, tá hesi umleið 30 grundstykkini, sum nú eru ávegis í útstykking, eru farin.

Men í eini 10 ára byggisamtykt hjá Fuglafjarðar Kommunu eru umleið 100 grundstykki tilsamans til sethúsabygging. Kommununar partur er bara umleið triðingurin av hesum, ella tey umleið 30 stykkini, sum øumrødd vórðu í gjár.

Eftir eru so hinir báðir triðingarnir, sum eru privat grundstykki í Fuglafirði.

Verður so farið út eftir vestara landinum, er væl av lendi eftir, sum egnað er til byggilendi, men sum bara ikki enn er lagt í byggiætlanina, sigur Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði.

Um Kambsdal sigur hann, at kommunan eigur allan dalin, sum er sléttur og væl egnaður at byggja á, og at har er nógv byggilendi eftir.

Har er ætlanin við tvíhúsunum komin so væl álegis, at kommunan hevur givið prinsipployvi til bygging av níggju tvíhúsum. Vónað verður, at klárt verður at flyta í tey fyrstu longu í ár.

Men sum vera man er byggilendið ikki óavmarkað, og hevur kommunan tí valt at royna aðrar loysnir. Her er tað íbúðarblokkurin, sum umrøddur var, kemur inn í myndina, sigur borgarstjórin.

Fuglafjarðar Kommuna hevur ætlanir um at byggja ein íbúðarblokk í seks hæddum heilt niðan undir Kamb, sigur Sigurd Simonsen, fyri á tann hátt at útnytta lendi betur.



*Útstykkingin í Stovugerði er kommunal. Umframt eru umleið 70 privat grundstykki eftir í Fuglafirði*